# FERÐAVINNA OG TRIVNAÐUR FUGLAFJARÐAR KOMMUNA



Skrivað og uppsett: Sissal Kj. Kristiansen
Rættlestur: Randi Kúrberg
Myndir: Knút Vesturtún, Sissal Kj. Kristiansen, Óluva Zachariassen, Stephane Ulrich og aðrar av netinum
Prent: Estra
Prentað: 27. apríl 2023

# INNIHALD


| | |
|---|---|
| Inngangur | 5 |
| Fuglafjarðar kommuna: ferðavinna og trivnaður | 6 |
| Miðbýarætlan, marina & býarrúm | 10 |
| Sandurin | 19 |
| Ferðavinnu undirstøðukervi | 23 |
| Samstarv við vinnuna | 30 |
| Fjøllini - gøtur og skelting | 33 |
| Hellurnar, ein fjaldur gimsteinur | 37 |
| Íblástur | 38 |
| Tilmæli og tíðarætlan | 42 |



# INNGANGUR

Ferðavinnupolitikkurin og menningarstrategiin fyri Fuglafjarðar Kommunu vísa á ítøkilig tilmæli, ið eggja til nýskapan og birta upp undir nýggjar møguleikar innan ferðavinnu og aðra upplivingarvinnu í Fuglafjarðar Kommunu.

Høvuðsendamálið við øllum ferðavinnuíløgum er, at tær fyrst og fremst gagna borgarunum og vinnulívinum í kommununi. At tær eru við til at betra trivnaðin í kommununi. At tær breiðka virkisgrundarlagið og gera kommununa vinnuliga meira fjøltáttaða og sum partur av tí gera kommununa til eina attraktivari kommunu at búseta seg í.

Í ferðavinnuhøpi er neyðugt við skipaðum umstøðum og fjøltáttaðum tilboðum, sum á burðardyggan hátt draga bæði føroysk og útlendsk vitjandi at sær, og samtíðis fremja trivnaðin hjá íbúgvunum í økinum við at fjálga um mentanarlív og virksemi.

Tilmælið til ferðavinnupolitikk og menningarstrategi er gjørt í tíðarskeiðnum 1. januar 2022 til 1. mai 2022 og er lagt fram fyri býráðið 12. mai 2022.

Arbeiðssetningurin var at:

- Gera eina langtíðarætlan fyri nýskapandi og burðardygga ferðavinnu í økinum
- Gera eina menningarstrategi við átøkum og tilmælum
- Tryggja, at ferðavinnan byggir á mentan og virkisfýsni í nærumhvørvinum
- Økja um møguleikarnar fyri vøkstri og menning í ferðavinnuni

Gransking vísir, at tess óforsøgnari karmarnir eru, minni hug hevur vinnan at gera íløgur. Tí er greidleiki av týdningarmiklastu lutum í vinnupolitikkinum hjá kommununi. Við hesum ferðavinnupolitikki og visiónum hevur kommunan fingið eitt amboð ella ein amboðskassa, ið kommunan kann nýta til at gera tað heilt greitt fyri verandi vinnu, íverksetarum og borgarum, hvat kommunan raðfestir og stílar ímóti.

Tilmælið til ferðavinnupolitikk og menningarstrategi fyri Fuglafjarðar Kommunu miðsavnar seg um 5 høvuðsøki:

- Miðbýarætlan
- Marinan og sandurin
- Gistingarmøguleikar og matarstøð
- Samstarv við vinnuna
- Gøtur og skelting

Eyðsæð er, at kommunan ikki kann lyfta øllum hesum sjálv, og heldur ikki í einum taki. Tað er eingin skjót og ómakaleys loysn, men ein langskygdur ferðavinnu- og menningarpolitikkur við størri íløgum og umleggingum, sum má gerast í eitt áramál. Málið verður rokkið stig fyri stig – við tíðini – í samstarvi við vinnuna. Í tilmælinum verður tó eisini víst á smærri ítøkilig átøk, sum kunna loysast skjótt, og eru tey signal um viljan hjá kommununi.

# FUGLAFJARÐAR KOMMUNA: FERÐAVINNA OG TRIVNAÐUR

Í sambandi við henda politikk er spurnablað gjørt, ið allir borgarar í kommununi eru eggjaðir til og hava fingið møguleika til at svara. Talið av svargevum er tínaverri ikki so høgt, einans 222. Spurningarnir vóru bæði kvalitativir og kvantitativir, og tók tað í miðal 17 minuttir at svara. Svargevarnir hava lagt nógv í og eru komnir við góðum og nærløgdum svarum við fleiri viðmerkingum og hugskotum til kommununa og spyrjaran. Umframt spurnablað hevur verið skipað fyri trimum fokusbólkum við borgarum í kommununi, umframt samrøðum við politikarar, íverksetar, verandi vinnu- og ferðavinnuumboð, starvsfólk í kommununi, hagastýri og borgarar í øllum trimum bygdum/býum.

### BORGARIN FYRST OG FREMST

Borgarar í Fuglafjarðar kommunu eru sum heild positivir um ferðavinnuna og síggja eisini góðar møguleikar í eini øktari ferðavinnu í kommununi. Fólk hava tó eitt fyrivarni, og er tað, at átøk, sum verða gjørd, eisini skulu gagna teimum sjálvum og teirra. Ferðavinnan skal vera við til at skapa virði fyri kommununa, tey lokalu og lívið hjá teim lokalu.

### BURÐARDYGG FERÐAVINNA

Ynskini hjá borgarunum í kommununi eru í tráð við rákið, sum er innan ferðavinnu. Stóri altjóða vøksturin í vinnuni hevur ført til eitt mótrák.

Ferðafólk tíma í alt minni mun at koma til støð, har tað eru ov nógv (onnur) ferðafólk, og ein uppreistur ímóti ferðavinnu sæst á teimum støðunum, sum hava lokkað til sín tær heilt stóru mongdirnar av ferðafólki. Ferðavinnan er farin at troyttast av ferðafólki, tí tað góða, mann helt, mann skuldi fáa burtur úr pengunum, sum ferðafólk løgdu eftir sær, hevur havt ein ov stóran prís fyri tey lokalu, - fyri trivnaðin á staðnum. Tað, vit hava sæð, er, at um ferðavinnan einans er transaktións- og mongdargrundað, so gagnar hon ikki staðnum í longdini. Hinvegin gevur ein væl tilvitað og skipað relatiónsgrundað ferðavinna eitt íkast til staðið, serliga tí at hon vil byggja á, stuðla og styrkja tað, sum borgararnir ynskja og trívast við.

Ein burðardygg ferðavinna tekur støði í staðnum og fólkunum á staðnum, fyrst og fremst. Ferðavinna er farin at snúgva seg meira um, at gesturin ynskir sær sannar upplivingar, sum spegla lívið á og av staðnum, tey vitja. Tey vilja ikki skemma staðið, tey vitja, tvørturímóti, tey eru forvitin um vanar, gerandisdag og mentan, og hvat er serstakt fyri stað og fólk. Og tess betur tey kunnu blenda inn, meira autentisk verður vitjanin.

Megnar mann í Fuglafjarðar kommunu at bjóða gestum upplivingar, sum fáa tey at kenna seg sum part av samfelagnum, sum 'temporary locals', ger tað ikki bert kommununa áhugaverdari at vitja, tað ger tað eisini hugaligari hjá kommununi sjálvari og teimum lokalu at fáa vitjan av ferðafólki.

Tess meira vit stýra ferðavinnuni tann vegin, vit kundu hugsað okkum, frá at vera transaktiónsgrundað til verða relatiónsgrundað, tess størri fer vælviljin á staðnum eisini at vera fyri ferðavinnuni.

Spurd, hvat tey halda um kommununa sum ferðafólkastað, eru fleirtalið jaligt.

Tað eru stabbarnir til vinstru, sum tala fyri ferðavinnuni, meðan teir høgrumegin annaðhvørt tala ímóti ella eru ógreiðir.

Sambært borgarunum er støðan ikki heilt eiðasør. 42,5% eru samd ella púra samd í, at Fuglafjørður, í dag, hevur nógv at bjóða ferðafólki. Á leið 26% eru ikki samd ella als ikki samd í hesum, meðan knapt 20% halda, at tað er hvørki. 11% vita ikki.

“Tá tað kavar, tá ruddar kommunan ikki Kirkju brekkuna, uttan so at tað er jarðarferð, og tá sleða børnini í brekkuni og øll bygdin savnast har. Ein dagin kom George frá ÍF við eini stórari grýtu av kakao og bjóðaði øllum børnunum. Tað er Fuglafjørður”

Tað bendir tó á, at her er eitt ótroytt potentiali, sum kommunan kann fáa ágóða av, tí til tilgitingina ´Fuglafjarðar kommuna kann fáa stóran ágóða av ferðavinnuni´ eru heili 69% jalig, knapt 17% vita ikki, 9% yppa øksl og siga hvørki, meðan einans 5% ikki ella als ikki halda, at Fuglafjarðar kommuna kann fáa stóran ágóða av ferðvinnuni. ZTá ið spurt verður um, hvat borgararnir halda um ferðafólk, so er fleirtalið aftur jaligt. Knapt 74% eru púra samd ella samd í tilgitingini ´eg gleðist, tá eg síggi ferðafólk í býnum/bygdini´. Beint yvir 5% eru ikki samd ella als ikki samd í tilgitingini. 16% yppa øksl og velja hvørki, og 5% vita ikki. Altso, eisini her er vektin serliga á vinstru síðu á stabbamyndini.

Spurnakanningin vísir altso, at borgarar ynskja ferðavinnuni vælkomnari. Tøl eru ikki beinleiðis frá fokusbólkum og samrøðum, men mynstrið er tað sama. Borgararnir eru jaligir um ferðavinnuna, so leingi ferðavinna er fyri tey og ikki øvugt.



# TRIVNAÐUR

Sambært spurnakanningini, so trívast borgararnir í kommununi væl. Heili 79% annaðhvørt stórtrívast ella trívast væl, har stórtrívast hevur munin við 42% ímóti 37%, sum trívast væl. Hóast trivnaðurin er góður, halda somu fólk, at tað eru batar at heinta, og at ting kunnu gerast væl betur, enn tey verða gjørd í dag. Tað koma vit aftur til.







Tá spurt varð víðari um trivnað, varð spurt nærri um ymsar parametrar, og teir 7, sum skoraðu best eru: grannalag, felagslív, arbeiði, samanhald trúarlív, ítróttalív og mentanarlív. Endamálið var at finna útav, hvat tað er, sum serliga skapar tann góða trivnaðin. Ítróttalívið er tað, sum flest siga hevur 'sera stóran týdning'. Hyggja vit at miðaltalinum fyri hvønn parametur, so er tað samanhaldið, sum hevur størstan týdning fyri trivnaðin, síðan felagslívið, mentanarlívið og so grannalagið.

Tað eru hesi fýra, ið skora hægst, sum tí eru mest áhugaverd at hyggja nærri at, altso tey sum eru oman fyri svørtu tvørgangandi linjuna.

Seinni varð spurt meira ítøkiligt. Fyrst, hvussu tey raðfesta ymisk tiltøk í kommununi, og seinni, hvønn týdning ávís tiltøk og ávísir felagsskapir hava fyri trivnaðin hjá teimum sjálvum og í kommununi sum heild.

Ikki heilt óvæntað eru tað Mentanardagar og Varmakelda, sum fara við hægstu skoru. 61% av svargevunum halda, at Varmakelda er nakað, sum hevur jaliga ávirkan á trivnaðin í kommununi sum heild og 64% fyri tey sjálv. Fyri tey sjálv eru tað bara Mentanardagarnir (81%), sum skora hægri enn Varmakelda.

## VARMAKELDA

Hóast tíðin er farin frá teimum siðbundnu bygdastevnunum, eigur mann heldur at vera kreativur og gera meira við Varmakeldu. Blása lív í og vera flaggberi fyri nýhugsaðari bygdastevnu, so tað eru nakrir hugnaligir og spennandi dagar

hjá fuglfirðingum og gestum. Samstundis kundi Varmakelda verið longd til at vera ein vika, ella eitt langt vikuskifti.

Sum aðrar bygdastevnur er Varmakelda stevnan, har frítíðar- og áhugafeløgini fáa vunnið pening til árið. Tað skal kommunan ikki í kapping við. Heldur skal kommunan stuðla undir og arbeiða fyri, at fleiri fólk koma til býin hesar dagar, og við tí gerast møguleikarnir hjá feløgunum í kommununi at vinna pening størri.

Kommunan stuðlar best við at seta fólk til at samskipa, menna og marknaðarføra. Saman, eiga kommunan og áhuga-, frítíðar- og ítróttarfeløgini (ein varmakeldunevnd) í samráð við ferðavinnu samstarvsbólkin at skapa eina Varmakeldu, sum gagnar øllum pørtum.

Ein umskapt Varmakelda hevði verið eitt gylt høvi at bjóðað ferðafólki til Fuglafjarðar og testað nøkur av teimum mongu hugskotum, sum eru í býnum til at skapa ferðavinnutilboð. Tað eru fleiri í kommununi, ið flirta við tankanum um at taka virknan lut í ferðavinnuni í kommununi. Men annaðhvørt føla tey seg ikki nóg trygg at fara allin, ella vilja tey ikki í ferðavinnuna burturav.

Varmakelduvikan kundi verið vikan, har øll hesi mongu hugskot blivu roynd. Soleiðis fáa potentiellir aktørar loyvi at royna seg, testa og tillaga tilboðini, so tey gerast burðardyggur partur av ferðavinnuni í Fuglafjarðar kommunu í framtíðini.

Skráin seinastu árini hevur altíð havt okkurt finurligt, kreativt og stuttligt, sum er sprottið úr spontanitetinum í kommununi. Eitt mál við Varmakelduni kundi verið at havt eitt nýtt skapandi tiltak við hvørt ár, sum avspeglaði kreativitetin í kommununi og soleiðis part av DNA'num. Tað hevði gjørt tað lættari at marknaðarført og eisini at gjørt Varmakeldu til nakað heilt serligt.

Um sniðgøturnar eru snøggaðar til ta tíð, kundi mann byrjað við sniðgøturennikapping, sum longu er eitt av hugskotunum, sum eru komin á borðið.



# 1

# MIÐBÝARÆTLAN, MARINA & BÝARRÚM



Á mangan hátt líkist Fuglafjørður tí, sum verður lýst sum ein idealbygd. Býurin er bygdur sambært einari fyrimyndarligari meginreglu um, hvussu ein býur verður til.

Býurin er kring ein fjørð, í lívd av fjøllunum, áirnar skera seg gjøgnum lendið, so tú fært nakrar natúrligar býlingar. Tað er einki linealbyggjarí, her eru fáar beinar gøtur, og mann kann tekna rundingar niðan gjøgnum bygdina. Í miðjuni er miðbýurin. Elsta grannalagið er niðast við sandin, við ósan. Hetta er eitt ideal, tað er soleiðis, ein býur eigur at síggja út og mennast og vaksa í vavi. Í Fuglafirði hevur tú hugnan niðri í býnum, og longur niðan í býin tú kemur, flottari verður útsýnið.

Hóast talan er um ein miðbý, so kennist hann ikki sum miðbýur, og er tað serliga høvuðsvegurin, sum førir buldrandi ferðslu til kai- og vinnuøki, sum ger tað. Fjarðarbýurin í síni náttúruvøkru kullu, vardur av høgum fjøllum, gevur ikki ta heildar- og býarkenslu, sum hann kundi. Heildin, sum kundi verið, kennist ikki. Høvuðsvegurin er á ein hátt sum smyril í staraflokki, fólk fáa heilt einfalt ikki náðir fyri honum. Tí er ein miðbýarætlan av týdningarmiklastu lutum, um vit vilja lyfta Fuglafjørð til ein bý, sum kann røkka sínum potentiali.

Býráðið og kommunan muga stíla høgt og fáa ein góðan arkitekt at gera eina ætlan fyri býin, eina ætlan, sum bæði fevnir um sálina í býnum, er ambitiøs, men sum eisini er realitisk, so ætlanin við tíðini kann fremjast í verki. Málið skal vera at fáa ein fagurfrøðiligan, samanhangandi miðbý, sum skapar trivnað, men sum eisini rúmar tí vinnu, sum longu er. Ein bý, sum lokkar fólk til og fær tey at trívast, - bæði tey, ið búgva og vitja her. Ein miðbýarætlan hevur stóran týdning fyri borgararnar og tí er tað altavgerandi, at teir verða tiknir við - spurdir og hoyrdir, áðrenn ein slík verður gjørd.

Fuglfirðingar ynskja sær fleiri grøn øki í býnum. Fleiri møguleikar til útilív fyri øll og fleiri trø. At tey góðu støðini verða betur knýtt saman, so sum frá sandinum til Miðstaðarlundina, sum í sjálvum sær er ein perla. Alt hetta og meira aftrat fer ein góð býarætlan at vera við til at skapa.

### MARINA

Sum býurin er staðsettur og við tí vinnulívi, sum er í Fuglafirði, er einki meira natúrligt enn at hava eina veruliga marinu.

Økið við sjóvarmálan, frá sandinum til bátahylin og seinni víðari til kaiøkið og frá íbúðabygginini úti á Land og til sandin, skal lívgast upp og „léttast um". Minni grót, asfalt og betong, meira innbjóðan til hugna og trivnað við trælagdari marinu við íbygdum trappusetingum, har fólk kunnu savnast.

Við stigvíst at betra um hentleikarnar við sjóvarmálan og við at gera fjørðin atkomuligari og hugnaligari stinga møguleikar seg upp, ið alsamt stimbra undir nýggj hugskot og virkisfýsni.

Økið við bátahylin, frá Patricks til bedingina, er eitt opið sár, sum við at vera gjørt til eina marinu hevði komið til sín rætt og prýtt heldur enn lýtt. Tað hevði styrkt og kveikt íverksetar og privata initiativið at skapa tilboð, sum sampakka við eina marinu; alt frá kajakkútleigan til annan vatnítrótt, til fiskitúrar og bátaútferðir. Við eini innbjóðandi

marinu verða eisini møguleikar skaptir fyri smærri matstovum ella kaféum, sum annaðhvørt hava opið ávísa tíð á árinum ella alt árið.

Ein góð marina ger tað eisini lættari hjá kommununi at marknðarføra kaikantin til smærri skip og frítíðarbátar at leggja at ella steðga á í Fuglafirði.

### BÝARRÚM

Hvat skapar ein bý? Vegirnir? Bygningarnir? Húsini? Grønu økini og fríøkini? Ella er tað fólkið, sum býr í býnum og tann samvirkan, sum er millum borgarnar í býnum og býarrúminum?

Liviligari tað er uttan fyri egnu fýra veggir, jú meira koma fólk út, og tess  meira koma tey í prát við hvønn annan, og tað er, tá ið menniskju møtast, at hugskotini verða til. Fleiri og betri býarrúmini eru, meira samvirkan verður millum fólk, og tað styrkir samanhaldið. Býarrúm kunnu vera bæði torg, spælipláss, sandur, bókasavn og marina. Tað eru støð, har borgararnir, kostnaðarfrítt, kunnu hittast og halda til. Fleiri og betri býarrúm eiga at vera partur av miðbýarætlanini hjá kommununi; í Fuglafirði, á Kambsdali og á Hellunum.

### BETRI BÝARTORG VIÐ MENTANARHÚSIÐ

Í miðbýarætlanini eigur hædd at verða tikin fyri, hvussu økið rundan um Mentanarhúsið betur verður knýtt til sandin - og sandurin soleiðis verður knýttur at miðbýnum.

Eitt ávíst torg er í dag, og verður tað nýtt bæði til lokal savnandi tiltøk so sum matmarknaðin á Mentanardøgunum, og tá tiltøk eru í Mentanarhúsinum. Men sum er, er tað meira ein forleingjan av Mentanarhúsinum, sum ikki virkar heilt optimalt, heldur enn at vera eitt veruligt býartorg hjá borgarunum.

Her má farast „all-in" og gerast eitt veruligt býartorg, ið bæði er størri og tryggari. Eitt býartorg, sum letur enn meira aftur millum Karvatoftir og torgið, umframt núverandi einvegis omankoyring (ml dansistovuna og Karvatoftir 9) og vegastrekkið oman til sjálvt parkeringsøkið við Mentanarhúsið.

Við at lata aftur gerst fríøkið uttan fyri Mentanarhúsið eisini beinanvegin størri og enn betri sum savningarstaður. Samstundis ger tað eisini kaféina í Mentanarhúsinum attraktivari at leiga hjá teimum, sum kundu hugsað sær at latið kafé upp har. Fyri vinnulívið hevur eitt veruligt býartorg ikki bert virði fyri Mentanarhúsið, men eisini hini støðini rundanum, so sum Patricks og Pitsa 530, sum kunnu hava útiservering á býartorginum.

### SPÆLIPLÁSS Á FISKASTYKKINUM

Fuglafjarðar býráð hevur ynski um áhaldandi fólkavøkstur. Skal tað eydnast og varðveitast, má trivnaðurin hjá barnafamiljunum raðfestast høgt.

Eitt afturvendandi ynski hjá barnafamiljunum er eitt alment, vakurt staðsett, spælipláss við bonkum og borðum, sum leggur upp til leik og spæl alt árið. Eitt stað, har børnini trygt kunnu spæla og mennast.

Eisini her má kommunan stíla høgt og gera eitt veruliga gott spælipláss. Í dag leita barnafamiljur sær í stóran mun útum kommunumark at finna góð og hugnalig spælipláss. Børn og foreldur mugu verða tikin við uppá ráð, tá ið spæliplássið verður skipað, so tað gerst til at eitt spælipláss, sum tey íðin vilja brúka, og sum tey halda seg eiga og vilja fara væl um.

Fleiri góð hugskot eru um, hvar rætta staðsetingin á spæliplássinum er. Niðri við sandin, í Miðstaðarlundini og á Fiskastykkinum eru trý teirra. Fyrimunurin við at gera spælipláss á Fiskastykkinum er, at tað er eitt øki, sum longu er friðað, og tí ikki kann brúkast til nógv annað enn býarrúm. Her er bygdarsøga, ið kann takast upp í spæliplássið og gerast partur av upplivingini. Rampa er longu á staðnum, og tætt er til skúlan.



Við tíðini kann smøl gøta gerast oman fyri býráðshúsið, ið knýtir Fiskastykkið til Miðstaðarlundina og soleiðis vera við til at knýta perlurnar í býnum saman uttan at leiða fólk út á vegirnar.

Eitt gott spælipláss er ikki einans gott fyri íbúgvarnar, men ger eisini býin meira lokkandi og spennandi fyri familjur við børnum, avbygdarfólk og útlendingar, ið koma á vitjan.

## SPÆLIPLÁSS Á KAMBSDALI

Umframt spælipláss í Fuglafirði er ynski um spælipláss á Kambsdali – ella rættari, at gera spæliplássið á Kambsdali liðugt. Sum áður nevnt, so er eitt gott spælipláss ikki einans gott fyri íbúgvarnar, men kann eisini fáa vitjandi familjur við børnum at leggja leiðina framvið.

## SNIÐGØTUR

Tað er ein rúgva av hugnaligum og góðum sniðgøtum í Fuglafirði. Smærri smalar sniðgøtur, sum gera tað skjótari at koma niðan í bygdina. Gøturnar knýta grannaløg saman, uttan at tað er neyðugt at fara eftir vegunum við nógvari ferðslu. Hjá teimum lokalu eru hesar sniðgøtur kendar gøtur, men fyri tann vitjandi sæst ikki á kortinum, hvør hugaligara og vakrara leiðin er at ganga. Størri virði eigur at vera lagt í hesar gøtur. Sum tað eisini varð víst á í „Dreymar um Fuglafjørð", eiga hesar gøtur at vera betur viðlíkahildnar og snøggaðar. Við tíðini eiga tær at vera betur upplýstar við hugnaligari ljósseting, t.d. lægri lyktapelum, fyri soleiðis at signalera at talan er um eina gonguleið.

Gøturnar skulu kortleggjast og gerast partur av skeltingini til gongutúrar í fjøllunum og partur av upplivingini hjá ferðafólki, tá ið tey vitja í Fuglafirði.

Spennandi og góðar sniðgøtur leggja upp til at verða gagnnýttar á annan hátt eisini. T.d. hava Kunningarstovan í Fuglafirði og einstaklingar fleiri hugskot um, hvussu størri og smærri tiltøk kunnu vera knýtt til júst hesar sniðgøtur, men til tað krevst, at tær eru í betri standi og kortlagdar.

## SNØGGA OG RUDDA

At tað er snøgt, væl skipað og vakurt, har vit búgva og virka í gerandisdegnum, hevur ómetandi týdning fyri okkum menniskju. Tað ger gott fyri kenslurnar hjá okkum fyri staðnum, vit kenna okkum væl, tað vekir stoltleika, og vit sýna staðnum betri ans av tí sama. Men tað hevur eisini jaliga ávirkan á trivnaðin, samanhaldið og framleiðslumegina. Vit gerast stoltari av staðnum og heimkærari. Tað gerst liviligari.

Sum ein borgari orðar seg 'vakurt umhvørvi skapar trivnað', og tað er júst hetta, sum kommunan í nógv størri mun má hava í huga. Hetta er galdandi bæði á Kambsdali, á Hellunum og í Fuglafirði.

Fuglafjarðar býur er snøggaður við Miðstaðarlund og vøkrum gongubreytum fram við høvuðsvegnum, og er tað nakað, ið borgararnir veruliga gleðast um. Men ein størri upprudding treingir til. Niðan fyri høvuðsvegin sær einki serligt út. Øll leiðin frá Mentanarhúsinum og yvir til bedingina rópar eftir eini bøtandi hond.

> “Eg luttaki á ruddingardøgum á Kambsdali … Ruddingardagar sum á KD hevði verið gevandi fyri øll grannaløg í kommununi”

Eitt gott dømi er myndin tikin uttan fyri Piddasahandil og Kunningarstovuna. Myndin kundi verið vøkur, men kampingvognurin, sum heldur tilvildarliga hevur fingið loyvi at standa við bilasavnið misprýðir, og gongur hetta mynstur aftur, - ikki bara í Fuglafirði, men eisini í hinum báðum bygdnum í kommununi.

Um kommunan gongur undan og ruddar kommunalu økini, fer tað heilt víst eisini at smitta borgaran - ‘tá grannin málar’-effektin. Tað er tó neyðugt, at kommunan slóðar fyri og í verki vísir, at hon leggur í, hvussu býurin og tær báðar bygdirnar taka seg út, bæði fyri gestum, men ikki minst fyri borgarunum á staðnum.



Á Kambsdali eru borgararnir saman um at skipa fyri ruddingardøgum og letur tað til at vera væleydnað. Um kommunan fast og afturvendandi skipaði fyri ruddingardøgum, kundi kommunan fingið beint fyri óruddinum, og álagt borgararunum at fingið sínar leivdir vekk av kommunalum øki, samstundis sum privat eisini høvdu fingið hampað um á egnum matrikli. Sum stuðul til sínar (eldri) borgarar kundi kommunan skipað fyri, at eldru skúlaflokkarnir hjálptu til, t.d. afturfyri stuðul til uttanlandsferð.

## FERÐSLUTRYGD

Tað er ein sannroynd, at ferðslan ígjøgnum Fuglafjørð er bæði tung og skjóttkoyrandi, og er hon mangan ótolandi bæði fyri íbúgvaran og tann vitjandi.

Bæði til fokusbólkarnar og í spurnarblaðnum hava borgararnir givið til kennar, at tey vilja hava eina loysn upp á tungu ferðsluna og ferðina eisini. Ferðmarkið í allari bygdini er 30 km/t. Ferðmarkið letur ikki til verða hildið.

Í miðbýarætlanini eigur avbjóðingin við ferðsluni at vera eitt fokusøki, men sum tað fyrsta eigur kommunan at:

- Tryggja, at ferðmarkarskeltini í býnum eru uppdateraði. Tey trý skeltini, tá ið tú kemur til Fuglafjarðar vísa á, at tað er 30 km sona. Tey eru gomul og verða ikki avlisin av intelligentu skipanunum, sum eru í nýggju bilunum.
- Gera (nýggja) ferðslukanning, har kannað verður, hvussu skjótt bilarnir koyra, og nær tunga ferðslan koyrir ígjøgnum býin. Hesi hagtøl eru av týdningi, tá ið arbeitt verður við miðbýarætlanini.
- Við hagtølunum í hond ber til at tosa við vinnuna um, hvussu mann kann loysa trupulleikan við tungu fersluni. Vinnan vil neyvan vera við til at skapa ótryggleika í býnum, og kann hon, við hagtølunum í hond, tosa við sínar kundar og veitarar, ið heldur ikki vilja, at teirra umdømi verður dálkað av, at bilarnir hjá teimum koyra ábyrgdarleyst í bygdum øki.
- Leiga og seta skelti við ferðamátara og áminning upp í styttri tíðarskeiðið sum átak at minna bilførarar á ferðmark og vísa á, hvussu skjótt koyrt verður.

"Kassabilakoyringin á Mentanardøgum er heilt serstakt. Tað manglaði seinast, líkasum matmarknaðurin manglaði."







“Sandurin, svimja, kajakk, gummibátur og stimitúrar”

“Fólk eru úti allastaðni, sandurin og fjørðurin liva”

“Aktivitetur á sandinum”

“gummibátar á sandinum”

“Oman á Sand”

“Góðir dagar á sandinum”

“Sóldagar á sandinum”





2

# SANDURIN

Sandurin er millum størstu aktivini í Fuglafirði. Í spurnablaðnum varð m.a. spurt, hvat tey seta í samband við summar. Heili 43% nevna sandin í sínum svari. 47% nevna einans sandin, t.d. "Hugni á sandinum" ella "sandurin". 53% av teimum 43 prosentunum nevna annað enn sandin, t.d. "Hugni heimi á sand, túrar niðan á Skarð, hjallurin í Miðstaðarlundini". Tað, sum er vert at leggja til merkis, er, at sandurin er tað orðið, sum gongur oftast aftur í svarunum. Tá ið spurt varð um sóldagar, var tað aftur sandurin, ið var tikin fram. Hesa ferð vóru tað 43% av svargevunum, ið nevndu sandin, annaðhvørt einsamallan ella saman við øðrum so sum "Sandurin og felagslív niðri í bygdini", "Alt er gott: sandurin, innandals, fjørðurin" ella "Vassa á sandinum ella ís frá Hjallinum".

Til fokusbólkarnar varð spurt nærri um sandin og týdningin av sandinum. Og heldur ikki her var nakar ivi - sandurin hevur sera positiva ávirkan á trivnaðin. Tí kemst ikki uttanum, at tað er neyðugt at tryggja, at sandurin verður varðveittur sum eitt gott stað fyri borgararnar. Men eisini í.sb.v. ferðavinnu halda borgarar, at við øktum fokusi á sandin og við at menna tilboð á og rundan um sandin til tey lokalu gerst sandurin eitt stórt aktiv hjá ferðavinnuni.

Fuglfirðingar ynskja at útnytta sandin og sjógvin betur, tey ynskja at tiltøk verða fyriskipaði á og við sandin. Sandurin skal gerast meira spennandi við útbygdum trivnaðarøki. Hentleikarnir skulu vera fleiri, betri og almennir, alt frá almennum vesi, til brúsur og skiftirúm, til pottar og sauna. Sum heild skulu umstøðurnar fyri at fáa størri nyttu og gleði av sandinum gerast betri, t.d. við betri gøtu og betri parkeringsviðurskiftum. Eitt útilívshøli á sandinum til svimjing, kajakk, felagslív v.m.

Fylgjandi átøk skulu gerast:

- Sandurin skal gerast størri (miðvíst koyra meira sand út).
- Sandurin sjálvur skal snøggast, og økið við sandin ruddast og haldast ruddiligt.
- Neystini við sandin skulu gagnnýtast.
- Almenn vesi og skiftirúm gerast.
- Kyrjasteinur og økið rundanum gerast vakurt.
- Rottangi til neyst, ið halda seyð




## GERA SANDIN STØRRI

Tað er ymiskt, hvussu stórur sandurin í Fuglafirði er. Flóð og fjøra hava sína natúrligu ávirkan, men hann flytur seg eisini av øðrum natúrligum veðurfrøðiligum orsøkum, so at hann til tíðir er størri enn aðrar tíðir. Eldri myndir vísa tó, at sandurin hevur verið væl størri, enn hann er í dag. Tað er ikki bert náttúran, sum hevur havt ávirkan. Gamalt var, at fólk tóku/keyptu sand í Fuglafirði, sum tey síðan brúktu at stoypa við. Orsakað av hesum eru fleiri í Fuglafirði, sum halda, at mann miðvíst átti at fylt nýggjan sand aftrat verandi sandi, so hann gerst størri, og meira verður at geva náttúrukreftunum.

Fyritøkan Sandship í Fuglafirði hevur bjóðað kommununi sand til hesa roynd miðvíst at gera sandin størri. Opinleiki er av avgerandi týdningi í hesum sambandi, og tí skulu borgarar verða kunnaðir í góðari tíð, áðrenn arbeiðið verður gjørt – tí kommunan eigur avgjørt at taka av hesum tilboði.

## SNØGGA OG RUDDA Á ØKINUM

Hóast sandurin er stórt aktiv fyri fuglfirðingar, er hann ikki serliga kendur sum vitjanarverdur fyri ferðafólk og onnur uttan fyri Fuglafjørð og nærmastu grannabygdirnar. Tað kemst helst av, at hann ikki altíð er eins fotogenur og tí ikki léttur at marknaðarføra.

Økið rundan um og við sandin má snøggast. Gestir mugu síggja, at tað er lætt at koma til sandin, og síggja fyri sær, at her vilja teir vera og njóta løtuna. Gjógvarávegur er smalur, og tað er tætt bygt oman fyri vegin. Tað avmarkar parkeringsmøguleikarnar. Tey fáu parkeringsplássini, sum eru oman fyri sandin, verða brúkt av íbúgvunum hinumegin vegin. Parkeringsviðurskiftini við Mentanarhúsið eru tó góð. Við at knýta (nýggja) Býartorgið við Mentanarhúsið og gera sandin (t.v.s. við Kyrjastein) ruddiligari og meira innbjóðandi gerst léttari at fáa bilar at parkera við Mentanarhúsið.

Tá marinu útbyggingin er gjørd, og umhvørvið rundan um Kyrjastein er snøggað og optimerað, verður tað enn sjálvsagdari, at her er góð inngongd til sandin hjá teimum, sum koma við bili ella úr bygdini.

Ódnin í januar 2022 fór illa við Gjógvarávegi, og tí er neyðugt, óansæð, at gera nakað við økið og

verja vegin móti brimi. Í tí sambandi er upplagt, umframt at hugsa marina, fagurfrøði og trivnað inn, eisini at fáa betrað um parkeringsmøguleikarnar tættari at ósanum – uttan at alt økið verður gjørt til parkeringsøki, tí heldur skal økið gerast innbjóðandi, lætt og grønt og ikki enn ein asfaltsblettur.

## NEYST GAGNNÝTAST

Av teimum neystunum, sum standa niðri við sandin, eigur kommunan fýra (sambært kortal). Semja hevur ikki verið um, hvat gerast skal við neystini. Mælt verður til, at kommunan setur tey í stand, snøggar tey, og ger tey til eitt aktiv á sandinum og fyri býin. Heldur skulu fleiri enn færri neyst standa við sandin, sum eru eitt virði og prýði fyri borgarar og gestir.

Tey eyðkendu føroysku neystini eru heilt serlig. Í tí stilla siga tey frá um okkara mentan. Tey hava sál og sjarmu og eru á mangan hátt av størstu søguforteljarum fram við sjóvarmálanum. Tey eru ímyndin av Føroyum og tí slowlife, sum ferðafólk leita eftir, tá ið tey koma til Føroya. Neystini við sandin eru í samljóð við umhvørvi, vinnuna í býnum, mentanina og framtíðar marinu. Tí liggur stórt virði í at seta tey í stand og gagnnýta tey, heldur enn at bróta tey niður og byggja annað uppaftur, sum ikki hevur hesa søgu at fortelja.

Neystini skulu hava eina „kerliga hond" og uppstigast. Summi til at kunna virka sum góð skifti- og brúsurúm til havsvimjarar og strandarfólk annars. Onnur kunna nýtast til sauna saman við pottum uttanfyri.

Eisini eiga summi at verða umvæld, so tey kunnu brúkast meira alment gagnligt. Um neystini verða gjørd, so tey hóska seg sum sølubúðir og kaféir, kunna tey leigast út til teirra, sum vilja hava kafé ella støkk-upp-sølubúðir. Ímyndið tykkum, at Føroya besti ísur fekst við sandin í Fuglafirði ella eina kafé við terassu út til sandin. Tess fleiri møguleikar eru fyri savningarstaði úti og øðrum virksemi úti og úteftir, tess meira stuðlar tað undir, at tað gerst ein góð heildarupplivíng at vitja sandin í Fuglafirði. Helst ein, sum fólk vilja royna aftur og aftur – og aftur.

## ALMENN VESI OG SKIFTIRÚM

Almenn vesi mangla sum heild í kommununi, tað veri seg á Kambsdali, á Hellunum og í Fuglafirði. Tá sandurin miðvíst gerst til eitt stað, sum dregur gestir til sín, verður enn størri tørvur á almennum vesum. Tørvur er á tí í dag, enn størri tørvur verður á tí í framtíðini, tá ið sandur og marina blóma.

## KYRJASTEINUR OG ØKIÐ RUNDANUM

Kyrjasteinur stendur sum eitt prógv um atgerðarloysi. Ósemja er um, hvørt hann skal varðveitast ella ikki, og hevur tað havt við sær, at einki verður gjørt. Henda støða gagnar andstøðupørtunum best, tí skjótt er einki eftir at bjarga. Kommunan eigur tí, í allari virðing, at geva Kyrjasteini tað sindrið av umsorgan, sum skal til, fyri at hann ikki heilt ferst.

Økið, Kyrjasteinur stendur á, má snøggast og ruddast, og báturin sjálvur málast, og ávíst viðlíkahald gerast. Tað nýtist ikki at vera størri og kostnaðarmiklari enn, at kommunan bjóðar teimum, sum leggja í at varðveita Kyrjastein, eitt høvi at gera ábøtur, rudda og mála. Ein aktivitetsdag, har kommunan gongur undan, á sama hátt sum kommunan í walisisku bygdini Aberaeron bjóðaði sínum borgarum ókeypis máling og fekk allan býin litríkan, tí fólk var við upp á tað (sí á síðu 39).

Eftir at nýtt lív er birt í, má avgerð takast um, hvussu hann framyvir kann vera gagnnýttur best.

Hugskotini eru mong, og kommunan má geva hesum ein møguleika, tí um friðing merkir forfall, sum tað nú tykist merkja, so er einki vunnið.

### TRIVNAÐARØKI OG BÝARRÚM VIÐ ÓSAN

Við ósan er gott øki at gera býarrúmið meira liðugt, eitt nú við fleiri borðum og bonkum og við tilknýti til víkingaútgrevsturin. Hugt eigur at verða eina ferð enn at gávuni, ið Havsbrún hevur bjóðað kommununi, tí talan er um stórfingna gávu, ið kann vera við til at gera økið við ósan til eina sanna perlu.

Tá marinan verður knýtt at sandinum frá íbúðabyggingini, kann hon eisini verða knýtt at fríðkaða økinum.



# 3

# FERÐAVINNU UNDIRSTØÐUKERVI

Eitt tað fyrsta, vit spyrja okkum sjálv, tá ið vit fara at ferðast til eitt nýtt og ókent stað, er, hvar kunnu vit gista, hvar kunnu vit eta, og hvat skulu vit síggja, uppliva og gera. Tað er alt hetta, vit fara at hyggja nærri at í hesum kapitli.

Sambært gallupkanning frá 2019 (umbiðið av VFI, VT og Tórshavnar Havn) er ikki óvæntað, at tað, ferðafólk brúka mest pengar uppá, tá tey eru í Føroyum, er gisting og matur. Tí er tað serliga óheppið fyri Fuglafjarðar kommunu, at tað eru júst hesi bæði, sum beinleiðis trot er á í kommununi. Gistingarmøguleikarnir eru so gott sum eingir. Tað eru nøkur einstøk AirBnB í Fuglafirði, á Kambsdali og á Hellunum, og so er eitt B&B á Kambsdali. Umframt tað eru kampingmøguleikar, men ikki av tí slagnum, sum dregur til og gevur meira pening. Matstovurnar eru eisini fáar. Í Fuglafirði eru nakrir møguleikar, men er hetta ikki optimalt útboð fyri veruliga at vera eitt tilboð til vitjandi.

Sum mál eigur kommunan at seta sær fyri, at gistingarhús skal vera í Fuglafirði í næstu framtíð, eisini eigur eitt mál at vera, at tað í øllum føri er ein kafé, sum hevur opið størsta part av árinum - um ikki alt árið. Í háárstíðini skal miðast eftir, at støkk-upp-matstovur, kaféir og onnur matartilboð eru. Áhugavert er, at hóast nýggjar matstovur og kaféir leggjast afturat, fer tað ikki at vera kapping-aravlagandi fyri Muntra, - tvørturímóti fer tað at draga fleiri fólk til og harvið eisini til Muntra.

Gallupkanningin frá 2019 varð gjørd á tveimum støðum: Á kaiini í Havn, har ferðandi við Norrønu og ferðafólk av ferðafólkaskipi vórðu spurd, umframt á flogvøllinum. Júst tað, at ferðandi av ferðafólkaskipi vóru við til at svara spurna-blaðnum sæst aftur, tí av teimum 560 fólkunum, sum hava svarað, vitjaðu 22,9% bert ein dag í Føroyum. Hetta eru gjarna tey, sum annaðhvørt koma í land nakrar tímar av ferðafólkaskipi, ella



tey, sum eru við Norrønu og leypa í land ta løtuna, meðan Norrøna liggur við kai. Taka vit hesi, sum ikki gista, burturúr og bert hyggja at longd av støðgi hjá teimum, sum liggja nátt í Føroyum, sæst, at tað eru lutfalsliga nógv, sum støðga lutfalsliga leingi (sí mynd). Sambært kanningini støðga 24% í 3 nætur, 23% 7 nætur, 15% 4 nætur og 12% 8-11 nætur. Hjá teimum, sum koma til Føroya við avmarkaðari vitan, ella sum bert kenna tey kendastu støðini, er skjótt at fylla 3 nætur, men eftir tað stendur meira opið hjá øðrum at lokka tey til, so tey kunna fylla allar 7 nætur. Verður gist í 7 nætur, kann hugast, at tey annaðhvørt gista í AirBnB, íbúð ella í summarhúsi, ella at gist verður á tveimum ella fleiri støðum.

Sum víst verður til aðrastaðni í hesum tilmæli til ferðavinnupolitikk, so flyta vit okkum frá eini transaktiónsgrundaðari til eina relatiónsgrundaða ferðavinnu, har útlendskir gestir kundu hugsað sær at upplivað veruliga staðið og heldur vilja vera temporary locals, enn ein flákrandi vera, sum bert loypur inn á eitt stað, meðan bussurin at kalla stendur í gongd uttanfyri. Til tess krevst, at ferðafólkið kann støðga á longur. Tað er týdningarmikið, at tilboð eru, sum geva møguleika fyri longri støðgi, alt frá eini kafé, har tey kunna seta seg niður, og á sín hátt mingla við tey lokalu, til gistingarmøguleikar, so tey kunna vera fuglfirðingar, hellufólk ella kambsdalsbúgvar í nakrar dagar. Eyðsæddi fyrimunurin við gisting er, at gesturin støðgar longur og við tí leggur meira eftir seg á staðnum.

Nettupp gisting er ein inntøka, sum veruliga munar á smærru økjunum, tí tey, sum gista, leggja ikki bert pening eftir seg á gistingarstaðnum, tey brúka eisini pening upp á aðrar upplivingar ella vørur á staðnum. Gesturin fær somuleiðis betri innlit í og fatan av staðnum, gerst betri við staðin og hevur fleiri góðar søgur um sínar upplivingar at fortelja øðrum. Mælt verður tí til, at kommunan setur hesi mál á dagsskránna, ongantíð ov skjótt.

## GISTINGARMØGULEIKAR

Sum áður nevnt, eigur kommunan at seta sær sum mál, at gistingarhús skal vera í Fuglafirði í næstu framtíð. Um talan er um størri ella minni gistingarhús, 'restaurant with rooms' ella beinleiðis hotel skal vera upp til tann, ið ger íløguna. Kommunan eigur tó at hugsa um, hvussu hon kann vera viðvirkandi til at íløgan verður gjørd. Verið tað seg við at lata lendi til, ella bara sum heild hava ein aktivan leiklut.

Fyrr enn eitt slag av gistingarhúsi er komið, gevur ikki ordiliga meining veruliga at tosa um vinnuferðavinnu og størri ráðstevnur, sum annars hevði verið so sjálvsagt í Fuglafirði við verandi vinnulívi, vitanarkraftsentri og einum Mentanarhúsi, sum kundi hýst størri ráðstevnu.

## SUMMARHÚSØKI ÚTI Á LAND

Kommunan eigur eitt øki úti á Land, ið hon er áhugað í skal gerast til útstykking til smáttur at leiga út til ferðandi. Í Vágunum eru tvær fyrimyndir: Útsýnið í Bø og Múlafossur Cottages í Gásadali. Í Bø vóru allar smátturnar klárar samstundis, meðan tær í Gásadali komu upp ein og ein. Í báðum førum er talan um privat framtak.

Óansæð, um summarhús ella smáttur verða bygdar úti á Land, á Kambsdali, á Hellunum, í Innara dali ella í Halgadali verður talan um privat initiativ og privata íløgu. Kommunan kann tó eggja til slíkt privat initiativ. Besti hátturin er fyrst at taka støðu til, hvat øki er hóskandi, og hvat øki kommunan hevur at selja/lata til endmálið og síðan fáa gjørda eina skitsutekning av, hvussu tað kundi

> “Vit mangla eina café - bæði til bygdarfólkið og ferðavinnuna”

tikið seg út. Við tí vísir kommunan, hvørjar visiónir hon hevur fyri økið, hvar hon vil hava tað staðsett, og at hon bjóðar privata initiativinum við.

Mælt verður til, at kommmunan umframt at seta lendi av til summarhús ger eina case, sum hon leggur fram fyri áhugaðum, hvørjir møguleikar eru, og hvørji ynski kommunan hevur. Vágs Kommuna hevur saman við Suðuroyar Sparikassa arbeitt við áhugaverdum hópfíggingarleisti til størri verkætlanir í kommununi. Leisturin nýtist ikki neyðturviliga at vera hin sami, men Fuglafjarðar kommuna átti hugt at, hvørjir møguleikar eru fyri at skapa ein fíggingarleist til summarhús í kommununi, har borgarar kunna vera partur av fíggingini og soleiðis eisini fáa eina ognarkenslu av ymsu frambrotunum í kommununi. Soleiðis gevur kommunan borgarunum eina tilsøgn um, at hon vil fáa hetta sett í verk, samstundis sum hon vísir, at hon vil hava borgaran við og geva honum møguleika at skapa innan fyri ávísar karmar.

## HOMETEL OG ANNAÐ

At fáa gistingarhús gjørt og at byggja summarhús tekur tíð, og fyrr enn hesi eru komin, hendir einki. Tørvur er á bústøðum í Fuglafirði til borgararnar, og er tað tí frá kommunalari síðu skeivt at eggja teimum, ið hava íbúðir og hús, ið standa tóm alt árið, at tey bjóða tey út á AirBnB. Tó letur til, at fleiri vilja leiga hús og kømur út í styttri tíðarskeið, men tey halda seg aftur av umsitingarligum ávum. Til hesi kann Kunningarstovan gera eitt vegleiðandi skjal, har hon hevur savnað góð ráð frá teimum, sum longu fáast við at leiga út, soleiðis at lættari er at fáa fleiri upp í skaran.

Tað, sum er minst líka áhugavert, er, at Kunningarstovan í Fuglafirði hevur gjørt klárt til at royndarkoyra ein gistingarleist, ið tey nevna Hometel. Tað tekur støði í einum tørvi, sum kunningarstovan javnan møtir, nevnliga tørvinum á hotel-líknandi gistingarmøguleikum í einum lítlum, tøttum, hugnaligum føroyskum býi ella hugnaligari bygd. Hometel gagnnýtir eitt óbrúkt yvirskot av ynskta ‘tilfeinginum’, nevniliga kømur runt um í kommununi, sum standa tóm, tí húsaeigarin ikki vil leiga tey út fulla tíð og hevur kanska ikki møguleika, tíð ella orku heldur at leiga út sum B&B, tí tað krevur ov nógv t.d. í reingerð, vask av seingjarklæðum, umsiting o.s.fr.

Við Hometel vera tómu kømurini í kommununi gagnnýtt, samstundis sum tað verður ein lætti hjá eigarunum at lata Kunningarstovuna taka sær av tí umsitingarliga og samskipanarliga arbeiðinum. Kunningarstovan fær fólk at taka sær av reingerð og seingjarklæðum, hon lýsir við gistingarmøguleikanum, tekur sær av fíggjarliga partinum og samskipar kalendarar, lyklar, morgunmat o.s. fr. Pengar liggja eftir hjá eigaranum, vaskifólki, morgunmatarveitaranum o.s.fr.

Áhugavert hevði verið at sett hesa royndarverkætlan í gongd, um ikki annað, so fyri at hava fleiri gistingartilboð í kommununi inntil eitt gistingarhús møguliga fær nøktað allan tørvin.

## HJALLAR OG NEYST TIL GISTING

Tað yður ikki í tómum neystum í kommununi, men bæði á Hellunum og í Fuglafirði eru nógv úthús og hjallar, og summi tykjast ikki at verða brúkt. Hesi óbrúktu kundu verið uppstigaði og gjørd til gistingarmøguleikar annaðhvørt sum í stíli við Neysting ella sum smærri ‚studio apartment‘ og marknaðarførd undir einum felagsheiti. Vert er at kanna, hvussu nógvir óbrúktir hjallar og óbrúkt úthús eru í kommununi, og um standurin á teimum er nóg góður til, at tey verða uppstigaði til endamálið. Og í síðsta lagi, um tað er áhugi fyri at arbeiða víðari við hesum, so sum at finna

fram til rætta fíggingarleist, og hvussu hetta kann gerast til eitt forvitnisligt konsept, sum hóskar seg til kommununa.

### KAMPING

Kampingøkið við Mentanarhúsið er ein fyribilsloysn. Men - annaðhvørt hevur mann eitt kampingøki, ella hevur mann ikki eitt kampingøki. Eitt parkeringspláss kann væl brúkast, men vil ein taka ímóti kampingvognum og húsvognum, mugu nøkur ting gerast væl betur. Tað er ikki nóg gott við streymkassum, og at víst verður til eitt heldur óhøgligt stað, har kampistarnir kunnu tøma bukkuna. Um eitt veruligt kampingøki skal gerast, má kommunan seta eitt øki av, ið ikki bert er asfalt, og syrgja fyri góðum og virðiligum umstøðum.

### MATARSTØÐ

Um bert eitt ting skal nevnast, sum borgararnir halda vera av avgerandi týdningi fyri at ganga teimum, teirra trivnaði og ferðavinnuni á møti, so er tað ein kafé í Fuglafirði. Ein kafé, sum er opin allar dagar í vikuni, alt árið. Fyrst og fremst sakna tey eina kafé til sín sjálvs. Harumframt eru tey sannførd um, at ikki bert er kaféin týdningarmikil fyri ferðafólk, men ferðafólk skapa størri grundarlag at tryggja kaféini lív alt árið. Altso ein win-win.

Fuglafjarðar kommuna skal aktivt virka fyri, at karmarnir og møguleikarnir hjá teimum, sum hava eina burðardygga ætlan og ynskja at skapa matstovu- og kafétilboð í kommununi, eru góðir. Hetta er ein av avgerandi fortreytunum fyri ferðavinnu í kommununi, og tí eigur kommunan at raðfesta hetta høgt.

Kommunan eigur ikki færri enn trý av støðunum, sum í dag eru støkk-upp-tilboð til borgarar og vitjandi: Mentanarhúsið, Ribarhús og Hjallin. Av teimum hevur Ribarhús støðugasta tilboðið.

Hjallurin er í síni náttúru ikki egnaður at hava opið allar dagar, árið runt í Føroyum. Mentanarhúsið hevur besta køkin, men við tí skiftandi virksemi, sum er í húsinum, og sum hølið er uppbygt, er ivasamt, um talan kann vera um ta slag av kafé, sum borgarar og gestir spyrja eftir. Tá er Mentanarhúsið betur egnað til støkk-upp-matstovu.

### LÚKUKAFFI OG RIBERHUS

Lúkukaffi og hósdagssuppa í Ribarhúsi er eitt framúr gott tilboð, sum serliga er væl egnað teimum lokalu. Tað er sanniliga gott fyri ferðafólk eisini, men ein kafé, sum bert er opin (fast) ein dag um vikuna, er ov lítið, um hon skal vera til gestir. Ein vansi við, at talan júst er um eitt vikuligt tiltak og gott initiativ hjá damunum í Piddasahandli, er, at tað kann kennast sindur uppsett. Tað eru tey, sum so inniliga ynskja, at hetta tilboð ikki skal detta niðurfyri. Tey stuðla initiativinum og møta trúliga upp, men av tí sama missir tilboðið eitt sindur av tí óbindandi, natúrliga og avslappandi andanum, sum er yvir eini kafé. Hølini eru sera væl egnaði, og andin kennist í húsinum. Lúkutankin er eisini stuttligur og passar væl til. Tó er neyðugt at endurhugsa konseptið, um Ribarhús skal vera einasta kafé í býnum. Mælt verður til at hyggja nærri at øllum konseptinum Ribarhús. Hvussu kann hetta spennandi, søguliga og vakra húsið, sum er mitt í býnum, og sum kommunan eigur, gagnýtast betur, so tað bæði rúmar eini kafé, handli, kunningarstovu, kvøldskúlatiltøkum og framsýningum? Er tíðin komin til at lata aðrar aktørar leiga seg inn og reka eina kafé? Ella skal tað skipast við støkk-upp-kafé ella -matstovu, so uppgávan at reka kaféina ikki liggur á teimum, sum hava Piddasahandil? Saman við Heimavirkisfelagnum eigur kommunan at endurskoða leistin og kanna, hvørjir møguleikar eru, samstundis sum tað spennandi virksemið, sum er í húsinum, verður varðveitt.

“as you can tell, we fell in love with the village and felt at home there”

ferðafólk úr Canada, AirBnB í Fuglafirði
(4-8 sept. 2019)



### HØLI TIL KAFÉ

Fyri nýggjar (yngri) íverksetarar, ið vilja lata eina kafé upp, er hølistrotið millum størstu avbjóðingar. Dreymarnir um at lata eina hugnaliga kafé upp, ið er opin hvønn dag og árið runt, eru í Fuglafirði, men hølini at leiga eru ikki. Við at byggja marinuna út kundi kommunan havt hølir til leigu í huganum, so hesi, sum vilja, eisini fáa ein møguleika. Ella tað er eitt av neystunum við ósan, ið verður leigað út til kafé, tá ið tað er uppstigað. Tað týdningarmiklasta er, at kommunan er tilvitað um, at tørvurin á kafé er til staðar, áhugin at reka kafé er til staðar, men tað eru hølini ikki.

### MATSTOVA

Muntra er ein av sterkastu ímyndum av Fuglafirði. Ein tíðarlummi, ein søguforteljing og eitt stað, sum serliga vendir sær til tey lokalu og ikki minst arbeiðsmenn. Fyri ferðafólk kann tað at koma inn á Muntra vera erligasti hátturin at uppliva ta ópretentiøsa og føroyska. Sum matstova, ið lokkar ferðafólk at staðnum, er Muntra kortini ikki staðið. Fuglafjørður skal hava bæði, Muntra og eina góða matstovu, sum umboðar tað besta úr sjónum, tí tað er tað, sum býurin umboðar. Ein góð matstova setur býin á kortið, men fyri at hava eina góða matstovu koyrandi, mugu kundar til. Tað er eisini her, at ein marina vil stuðla undir, at fleiri fólk, býarbørn og uttanbíggjarfólk, koma á gátt. Til ferð er komin á ferðavinnuna, er ein støkk-upp-matstova tí tað mest realistiska. Mentanarhúsið hevur góðar karmar at hýsa støkk-upp-matstou og kafé. Køkurin hevur eisini verið gagnnýttur til ymisk serlig tiltøk í býnum, og hevur tað tá eydnast væl. Kommunan má eggja og birta uppundir, at støkk-upp-matstova oftari verður í Mentanarhúsinum og serliga í háárstíð. Eitt konsept, sum ikki eru nýggir tankar í Fuglafirði, ið hevði hóskað sera væl, var, um primera ráværan, sum borðreitt varð við í støkk-upp-matstovuni, var rávøra frá fyritøkum í Fuglafirði.

### UPPLIVINGAR

Sum áður víst á, so er millum fyrstu spurningarnar vit seta okkum, áðrenn vit vitja eitt nýtt stað, hvat skula vit gera, síggja og uppliva? Fyri meginpartin av ferðafólkunum, sum vitja í Føroyum, er tað náttúran, sum dregur. Í gallupkanningini, ið áður er víst til, siga 60,5%, at náttúran er høvuðsorsøkin til, at tey eru komin til Føroya. Hugsast kann, at hetta tal var enn størri, um cruiseferðafólk ikki luttóku, tá ið tey meira enn so illa nokk vita, hvat tað er fyri land, tey vitja. Vakra náttúru hevur Fuglafjarðar kommuna í ríkiligt mát, Kambsdalur, Hellurnar og Fuglafjørður eru øll í sera náttúruvøkrum umhvørvi. Fjøllini eru einastandandi; kongalig, ræðandi og dragandi. Frá sjónum og við sjóvarmálan er kommunan eisini rík, Pollurin, Fuglafjørður og Oyndarfjørður bjóða til upplivingar, bæði at fiska og njóta. Og so er tað tað, sum kommunan er mest kend fyri í Føroyum, nemliga mentanarlívið.

> **“Tað mangla smábátar at sigla við ferðafólki, har mann sær náttúruna, ímeðan mann fiskar”**

Seinni í hesi frágreiðing verður komið nærri inn á gongutúrar í fjøllunum, og verður tí ikki komið nærri inn á tað her. Í tí partinum verður eisini víst til ferðaleiðaratoymið, sum víst verður til niðanfyri.

## FISKI- OG BÁTATÚRAR

Bátahylurin í Fuglafirði er fullur í bátum, og tað kann undra, hví hesir, júst í Fuglafirði, ikki oftari eru úti við ferðafólki. Orsøkirnar kunna vera serligu trygdarkrøvini, ið verða sett til ferðafólkatúrar, manglandi tíð ella hugur. Kunningarstovan hevur arbeitt fyri at fáa bátaeigarar at fara fiskitúrar og/ella sightseeingtúrar við ferðafólki, men tað hevur ikki eydnast til fulnar enn. Hvat kemur fyrst, hønan ella eggið? Øll ferðavinnutilboð taka tíð at byggja upp, og so er eisini við fiski- og bátatúrum. Kunningarstovan kann ikki marknaðarføra hetta tilboð uttan veitara. Mælt verður tó til, at Kunningarstovan ikki sleppur tráðuni, men áhaldandi arbeiðir fyri at fáa báta- og fiskitúrar á skrá í Fuglafirði, kanska í samstarvi við Bátafelagið. Eitt samstarv millum Kunningarstovuna og Bátafelagið, har ein fastur leistur verður lagdur fyri, hvussu og nær túrarnir verða bjóðaðir út, umframt hjálp til at fáa gongd á loyvisumsókn hevði gjørt tað ómakaleysari hjá teimum bátaeigarum, sum halda hetta vera áhugavert at fara í holt við. Fyri at Kunningarstovan kann bjóða eitt álítandi tilboð til ferðafólk, kann leisturin við toymi, eins og við ferðaleiðaratoyminum, sum komið verður nærri inn á í næsta kapitli, verða brúktur.

## MENTANARTILBOÐ

Millum føroyingar er Fuglafjørður kendur fyri síni mongu listafólk, sítt ríka mentanarlív og handverksmentan. Hetta er alt nakað, sum sigur okkurt um sálina í Fuglafirði, og sum er partur av upplivingini, sum gestir í Fuglafirði eiga at hava fingið kensluna av eftir at hava verið á vitjan í kommununi. Stuttligast er, um tey eisini fáa ein smakk av hesum, altso ikki bert eygleiða, men eisini hava møguleika at koma nærri at listafólkum og handverkslistafólkum. Hetta kundi verið við at vitja listafólk fyri gjald og við møguleika at keypa frá teimum eisini. Talan kundi verið um heimakonsertir, men tað kundi eisini verið smærri verkstovur, eitt nú við støði í teimum mongu góðu tilboðunum, sum longu verða fyriskipaði av kvøldskúlanum. Hugskotini eru heilt sikkurt mong í kommununi.



# 4

# SAMSTARV VIÐ VINNUNA

Eitt serligt trivnaðar- og menningarsamstarv skal gerast millum borgaran, vinnuna og kommununa. Ein ávís samráðing skal til, so at báðir partar eru samdir um, at tað er ein avtala, sum gagnar øllum, men lagt verður upp til at stovnseta eitt trivnaðar- og menningarráð, sum hevur til endamáls at stuðla uppundir trivnaðin í kommununi. Tankin aftan fyri tilmælini í hesum kapitli eru umrødd við partar av vinnuni og vinnuráðið í kommununi, og er vinnan jalig um hugskotið. Vinnan sær tað sum ein góðan møguleika at vera við til at stimbra undir ferðavinnuna og íverksetan í Fuglafirði og at geva aftur til fólkið á staðnum. Høvuðsuppgávan er at menna, ráðgeva og stuðla, bæði við nýhugsan og nýskapan innan íverksetan, ferðavinnu og trivnað í kommununi sum heild. Íblásturin kemur frá m.ø. Vinnuframa, Visit Faroe Islands og Wonderful Copenhagen og verandi kreativiteti í Fuglafjarðar kommunu.

Vinningurin við at seta á stovn trivnaðar- og menningarráð ella samstarv er, at tað byggir brýr og skapar økt samstarv millum borgaran, vinnuna og kommununa. Heildin verður styrkt av eini greiðari fatan av ymsu pørtunum. Allir partar vilja heildini og kommununi væl, men í løtuni tykist samskiftið ikki vera optimalt.

## TRÍGGJARKRÓNUGRUNNUR

Frá Visit Faroe Islands kenna vit krónu-fyri-krónu stuðulsleistin. Endamálið við játtanini er at samstarva um nýskapandi átøk, sum gagna ferðavinnuni. Møguleiki hevur verið at søkja um stuðul frá VFI, sum eftir ávísum kendum metingarstøði hevur viðgjørt umsóknirnar og valt at stuðla teimum verkætlanum, sum hava verið í tráð við mál og mið hjá VFI og innan stuðulsjáttanarkarmin. Fyri hvørja krónu, VFI hevur stuðlað við, skal umsøkjarin sum minimum leggja eina krónu.

Í Fuglafjarðar kommunu verður mælt til líknandi skipan, ein krónu-fyri-krónu-fyri-krónu stuðulsleist. Eitt ráð, mannað av umboðum fyri verandi vinnu og kommununa, vil viðgera umsóknirnar frá borgarum í kommununi, og fyri hvørja krónu borgarin leggur í verkætlanina, vil vinnan leggja eina krónu og kommunan leggja eina krónu.

## RÁÐGEVARABANKA

Endamálið við Vinnuframa er at stimbra tað góða hugskotið, og ein háttur, ið Vinnuframi stimbrar, er við Ráðgevarabankanum at bjóða ráðgeving til íverksetar.

Fuglafjarðar kommuna er ríkað við einum sterkum og slóðbrótandi vinnulívi. Fyritøkurnar eru kendar fyri at vera framburðarfúsar, nýhugsandi og fyri at kenna sína vitjanartíð. Ein dygd, ið longu hevur tænt kommunu og borgarum væl.

Henda dygd kann koma kommununi og borgarum enn betur til gagns. Við einum sparringsráði ella ráðgevingarbanka, har íverksetar í kommununi kunnu fáa skipaða ráðgeving og sparring frá vinnulívinum, fer verandi vinna at kunna lyfta kommununa longur fram á leið. Talan verður um eina formella skipan, har borgarin kann søkja um ráðgevingarstuðul til ávísa verkætlan ella ávíst átak, og trivnaðar- og menningarráðið tillutar eitt givið tal av tímum saman við vinnulívsfólkum, ið eru partar av skipanini.



### TRIVNAÐAR- OG FERÐAVINNURÁÐ

Triðja beinið í trivnaðar- og menningarsamstarvinum er trivnaðar- og ferðavinnuráð, ið skal menna hugskot í kommununi, sum gagna trivnaði og ferðavinnu. Fastir limir í samstarvinum eru Kunningarstovan og umboð fyri vinnudeild og mentanardeild í kommununi. Umframt tað eiga tað at vera 1-3 umboð fyri borgararnar; ferðavinnuáhugaðir og hugskotsríkir borgarar.

Tað trýtur ikki við kreativum og spontanum hugskotum í kommununi. Endamálið við trivnaðar- og ferðavinnuráðnum er at hjálpa til við at fáa hesi hugskot framd í verki. Borgararnir skulu kunna umrøða og viðgera síni hugskot í ráðnum, so tey verða lyft upp á eitt enn hægri støði og ment í tráð við visiónina hjá kommununi - og í summum føri ment og gjørd klár til at fara víðari í 3-krónugrunnin.

Visiónirnar hjá kommununi, fyri hvussu kommunan skal mennast innan ferðavinnu og trivnað, skulu virka sum leiðreglur í samstarvinum, so tryggjað verður, at tiltøk og átøk stuðla heildini og visiónini.

Dreymar um Fuglafjørð - fokusbólkar - spurnablað - prát við borgarar - hvar enn vit hyggja ella spyrja, fáa vit prógv fyri, at borgararnir í kommununi hava eitt ótal av hugskotum og ynskjum um, hvussu kommunan kann gerast ein (enn) betri kommuna at búgva og liva í. Góð, skeiv og stuttlig hugskot, sum veruliga eru við til at seta kommununa á kortið. Bara tað, at skipað hevur verið fyri eini hugskotskapping við heitinum 'Dreymar um Fuglafjørð' sigur ikki lítið. Hvar aðrastaðni er kassabilkappkoyring? Ella hvar aðrastaðni verður ein brekkastongd av, tá ið kavi er, so borgararnir kunna sleta trygt?

Tað eru øll hesi mongu spontanu og kreativu hugskotini hjá borgarum, sum skulu kunna mennast í trivnaðar- og ferðavinnuráðnum. Summi enda við at verða ferðavinnutilboð beinanveg, onnur fara í 3-krónugrunnin og onnur testaði á Varmakeldu ella til Mentanardagar ella í øðrum sambandi.

**"Kassabilakoyringin á Mentanardøgum er heilt serstakt. Tað manglaði seinast, líkasum matmarknaðurin manglaði."**



5

# FJØLLINI - GØTUR OG SKELTING

Tað eru fjøllini, ið knýta kommununa saman. Tey eru innbjóðandi og avbjóðandi, og tey eggja til gongutúrar. Tað er tó avmarkað, hvussu nógvir ferðaleiðarar eru klárir at fara í fjøllini við ferðafólki, og tíanverri heldur ikki øll ferðafólk, sum vilja hava ferðaleiðara við á ferðini. Gamla bygdagøtan millum Hellurnar og Fuglafjørð er helst tann best umtókta varðagøtan. Varðagøtan um Jøklaskarð verður eisini gingin, men gongufólkið velur í eins stóran mun at fara túrar niðan á Húsar, Altarið og Borgina ella til Trælavatn. Tað er ymiskt, hvat dregur. Summi vilja bert ganga ein góðan og tryggan túr eftir varðagøtu. Onnur vilja røkka tindunum, og onnur leita eftir besta útsýninum. Umráðandi er at leiða tey trygt og væl á røttu leið. Tá hetta ikki kann gerast við ferðaleiðara, kann tað gerast við varðum, gøtum og skeltum, men til ber eisini við søgum at leiða tey, sum kundu hugsað sær vitan og útsýni.

### QR-FERÐALEIÐARIN

Kunningarstovan skal hava nýggja heimasíðu. Á nýggju heimasíðuni eigur at vera víst til fleiri og ymiskar túrar í fjøllunum kring um í kommununi. Við ferðaleiðara verður altíð farið tryggastu áhugaverdastu leiðina, bæði hvat søgu og útsýni viðvíkur. Men við góðari kortlegging kann hetta eisini gerast uttan ferðaleiðara.
Um kommunan kortleggur allar hesar túrar við søgum og útsýnisstøðum, hevur hon tikið eitt munagott stig til at fáa fólk at ganga røttu og bestu leiðina. Har gomlu varðarnir ikki eru, kunna steyrar setast upp. Eisini kunnu smærri skelti verða sett upp. Skelti, sum vísa á, hvat er serliga áhugavert á hesum stað, hvat ein sær, hvør søgan er, og hvat ein skal varnast ella halda serligt eyga við.

Hetta er rúgvusmikið arbeiði, bæði at skitsera leiðirnar við tilhoyrandi søgum og at fáa gjørt nóg nógv skelti, tí tað kostar. Upplagt er tí at byrja við túrunum úr Fuglafirði til Hellurnar og úr Fuglafirði um Kambsdal til Trælavatn, tí hetta eru mest gingnu túrarnir. Seinni kann hetta verða útbygt sambært raðfesting, og sum ráðini verða til tað.

Ein bíligari og fleksiblari loysn er at merkja túrin við QR-kodum. QR-kodum, sum beina inn á ein ávísan túr, ið er á heimasíðuni. Eitt nummar skal standa til hvørt útsýnispunkt, t.d. hevði Malunarhav havt eitt nummar, sum tann ferðandi kann lesa um á heimasíðuni ella á pdf'inum.

Tað munna vera tey fækstu, sum ikki hava telefon í lummanum, tá ið tey fara í fjøllini, tó er ikki vist, at tey hava internetsamband. Niðri í bygdini, á Kunningarstovuni og har tað er ókeypis wifi, kann kommunan eggja gongufólki at skanna sær QR-kodu inn, sum førir til ávísa túrin ella ávísu

túrarnar í fjøllunum, og goyma síðuna á telefonini, áðrenn farið verður. Soleiðis hava tey leiðina við hondina og kunnu lesa um tey ymisku støðini á leiðini - sjálvt uttan internetsamband. Tess betur túrurin er lýstur, og tess betur útsýnisstøð hann førir til, jú betri tænir túrlýsingin sínum endamáli, sum er at fáa fólkini at ganga eftir ynsktu leiðini. Hetta ger tað ikki bara áhugaverdari og tryggari fyri gongufólkið, men eisini gott fyri hagaeigararnar, tí túrurin lokkar fólk inn á ta leið, sum hagaeigarnir vilja hava tey at ganga.

Tess interaktivari síðan er, tess betur fær hon boðað frá, nær fjallgonga er, og nær hagin er stongdur fyri haruskjóting o.s.fr. Heimasíðan verður eitt gagnligt stýringstól fyri fleiri – um ikki hjá øllum. Hagastýrini kunna annaðhvørt sjálv ella við hjálp frá Kunningarstovuni, upplýsa á síðuni, nær tey vilja friða hagan fyri ferðafólk. Eisini kann verða upplýst, hvussu mann ber seg skilabest at, tá ið mann er í haganum og annaðhvørt kemur illa fyri, ella hvat er rætt at gera, møtir mann eini fjallgongu. QR-kodurnar kunna setast á toppin á steyranum og soleiðis ikki gera seg inn á náttúrna meira enn longu verður gjørt.

## KORTLEGGJA TÚRAR

Nakrir av túrunum eru longu kortlagdir og gjørdir, og sum skilst eru aðrir í gerð. Søgurnar eru tó ikki niðurfeldar, og er tað eitt arbeiði, ið má gerast. Kommunan eigur at seta fólk til hesa uppgávu og biðja heimildarfólk og gongufólk, sum kenna søgurnar og tey mongu vøkru støðini, og sum kunna vera við til at merkja steyrarnar á rætta staðnum. Hetta er ein uppgáva, ið ikki kann bíða, tí alt ov mong dømi eru um, at fólk verða biðin ov seint, og tær bestu søgurnar (og upplivingarnar) fara ofta við teimum góðu frásøgufólkunum. Spell, um tað ikki verður varðveitt.

## SØGAN UM ...

Verkætlanin 'søgan um ...' hevur til endamáls at savna søgur um kommununa, t.e. alt frá 'søgan um Kyrjastein' til 'søgan um Ribarhús' til 'søgan um ÍF fótbólt'. Hetta er ein spennandi verkætlan, har málið er, við tíðini, eisini at gera søgurnar til ljóðfílur, sum kunnu hoyrast sum poddar. Nú vit eru í fjøllunum, kann hugsast, at hesar søgur við tíðini verða umsettar og eisini gjørdar um støð í fjøllunum og hagunum kring um í kommununi. Hesar søgur, og túrlýsingarnar, ið verða gjørdar til heimasíðuna, kunnu síðan verða lagdar á heimasíðuna, so tær eins og við túrlýsingunum kunnu takast niður við QR-kodum, og gongufólk kunnu hoyra søguna á staðnum heldur enn lesa.

## FUGLAFJØRÐUR TIL HELLURNAR (OG ALTARIÐ)

Tað er lutfalsliga nógv „ferðsla" av teimum, ið ganga leiðina úr Fuglafirði til Hellurnar, ella úr Fuglafirði niðan á Altarið. Hagastýrini í Skarðhaga og Fjalshaga hava tó ikki trupulleikar av hesum sum so, tó vilja tey hava, at gøtan verður fylgd. Avbjóðingin er, at víst verður til tvær ymiskar inngongdir til varðagøtuna, og førir tað til ávísa ósemju. Tvey kort eru, sum siga, hvar gamla bygdagøtan er, og tað ørkymlar. Onnur gongur frá Innandalsvegi, oman fyri vøllin, eftir Skarðsrás niðan í hagan. Hetta er eisini leiðin,

ið hagastýrið vil hava, at gongufólkið fylgir. Hin tilvísingin gongur frá Sevdalsvegi. Seinna leiðin er lættara leiðin at ganga og tann, sum flestu bygdafólkini velja at ganga.

Best er, um øll ganga somu leið, tí tá kann hagastýrið heingja skelti upp, ið sigur frá, um tey eru á fjalli og ikki vilja hava óviðkomandi í hagan, men hetta gerst truplari, um fleiri inngongdir eru. Um tað eydnast at fáa bygdafólkið at ganga eftir ynsktu leiðini er ivasamt, men ferðafólk eiga at verða leidd at ganga eftir Skarðsrás.

Hagastýrini fyri Skarðshaga og Fjalshaga eru jalig um ferðafólk, men tíma illa, at hegnið verður traðkað niður. Ein loysn er at seta hegnstiga upp við Altarið, ein lítil prísur at gjalda, og nakað kommunan eigur at fáa avgreitt beinanvegin umframt ein QR-kodu, ið greiðir frá, hví hegn er í haganum. Soleiðis verður eisini sagt um fyrimunir tá ið ein rekur, um hagapartar, o.t. Heitt kann eisini her verða á gongufólk um at fara væl við hegninum, tí so heldur tað longri, og tað er umhvørvisvinarligari.

## SKELTING

Eitt skelti er niðri við bókasavnið, ið vísir, hvønn veg ein skal fyri at koma niðan á varðagøtuna um Skarðið. Hetta er gott, men fleiri skelti mugu til. Skelti, sum leiða ferðafólk niðan til Skarðsrás, og skelti við Skarðsrás, ið greitt tilskilar, at hetta er leiðin niðan á Skarð. Skelti skulu eisini vísa leiðina Inn í Dali, umframt at skelti mugu verða sett upp, sum føra til steyra og varðagøtuna niðan á Trælavatn.

## CLOSED FOR MAINTENANCE

Sum útgangsstøði eigur kommunan altíð at melda seg til at vera við í átakinum Closed for Maintenance hjá Visit Faroe Islands. Umframt at vera sera góður háttur at fáa gjørt gøtur og ábøtur í kommununi, so er tað eisini við til at marknaðarføra kommununa og ein góður háttur at vera sjónlig og í huganum hjá føroysku ferðavinnuni.

## FERÐALEIÐARATOYMI

Sum nevnt er tað avmarkað við lokalum ferðaleiðarum. Avbjóðingin er, at tey, sum hava áhuga, ikki vilja ella kunna binda seg til at hava fastar túrar so ofta. Tí hevur Kunningarstovan roynt seg við ferðaleiðaratoymum. T.e. toymi við 3-4 ferðaleiðarum, sum binda seg til at gera ávísar túrar. Talan er um eina minni bindandi loysn, tí tá tilmeldingar eru til túrin, eru størri sannlíkindi fyri, at ein í toyminum kann átaka sær uppgávuna. Mælt verður til at útbyggja hesa skipan og soleiðis fáa bjóðað fleiri skipaðar túrar í fjøllunum. Leisturin hóaskar seg sera væl til Fuglafjarðar kommunu og er eisini serstakliga væl egnaður til onnur tilboð, so sum fiskitúrar, mentanartúrar o.a.

## GØTAN TIL KAMBSDALS

Gøtan til Kambsdals má gerast liðug. Hon hevur týdning fyri borgararnar, ikki minst kambsdalsbúgvar, og so er hon eitt gott íkast til ferðavinnuna.

# 6



# HELLURNAR, EIN FJALDUR GIMSTEINUR

Í november 2020 var gongd sett á Helluverkætlanina. Ein heildarverkætlan, sum hevur til endamáls at fríðka um og gera ábøtur í bygdini. Talan er um eina framúr áhugaverda verkætlan við fagurfrøðiligum ábótum og átøkum, sum bæði gagna trivnaði í bygdini og ferðafólki, ið annaðhvørt eru komin til gongu um skarðið ella við bili. Víst verður tí til Helluverkætlanina, og mælt verður til framhaldandi at arbeiða við henni. Tað er trupult at siga, hvat er meira umráðandi enn annað, tí fyri bygdina eru øll viðkomandi. Men 'fokusøki 3: Parkering og vesi við Lækjuna' er serliga viðkomandi fyri ferðavinnuna.

## HELLURNAR OG FERÐAFÓLK

Vælvildin móti ferðafólki trýtur ikki á Hellunum. Hellufólk tíma væl at hava ferðafólk, tað gevur lív í bygdina og ljós í húsini. Mest av øllum tíma hellufólk at hava ferðafólk, sum eru sjónlig í bygdini. Fólk sum heilsa uppá, sum eisini brýggja seg um bygdarsálina. Men hóast tey fegin vilja hava ferðafólk, so er veruleikin, at miðalaldurin er hægri á Hellunum enn aðrastaðni í kommununi. Tey, sum hava aldurin til tað, vilja fegin gera sítt og arbeiða eisini við ymsum møguleikum, so tey kunnu taka betur ímóti ferðafólki í háárstíð.

Sum bygd hava Hellurnar nógv av tí, sum útlendsk ferðafólk leita eftir, tá tey koma til Føroya. Náttúran er avbera vøkur, bygdin er sjarmerandi, fólkið fyrikomandi, her er friður, møguleikarnir at njóta náttúruna nógvir, og haraftrat er lætt at ferðast runt um í landinum við útgangsstøði í Hellunum. Potentialið er stórt, serliga um ein leggur seg eftir ferðafólki, sum kemur til Føroya at uppliva náttúruna, friðin og føroysku bygdarsálina.

Tað eru nøkur summarhús, sum ferðafólk kunnu leiga, upplagt hevði tó verið at fingið fleiri. Á tann hátt kommunan kann vera viðvirkandi til at fáa bygt summarhús til útleigan, eigur hon at gera tað. Íbúgvarnir vilja, at summarhúsini eru í bygdini, so at lív og ljós kemur í bygdina heldur enn uttan fyri bygdarportrið.

Kommunan eigur ikki nógva jørð, sum hon kann lata til endamálið, men á sama hátt sum mælt var til úti á Land, kann kommunan eftir at hava samráðst við staðbundnu nevndina fyri Hellurnar og jarðareigarar fáa gjørt yvirskipaða skitsutekning yvir, hvussu eitt summarhúsøki kundi tikið seg út á Hellunum og soleiðis fingið boðið hetta arbeiði út.

# 7

## ÍBLÁSTUR

*Íblástur er at finna um allan heim. Her eru 6 átøk, ið kunna geva íblástur til, hvat gerast kann í Fuglafjarðar Kommunu. Talan er ikki um beinleiðis tilmæli, hóast mælt verður til at meta um, um ikki okkurt av hesum kann geva íblástur.*

### ÍBLÁSTUR ÚR SAKUSHIMA, JAPAN

Lítla oyggin Sakushima í Japan hevur verið merkt av stórari fólkafráflyting, frá 1600 íbúgvum í 1947 til 250 í 2000. Fyri at fáa vend í var verkætlan sett í verk í 2000, sum hevði til endamáls at lokka fólk til oynna og við tí geva íbúgvunum eitt vinnugrundarlag. Oyggin skuldi vera eina lista- og ferðavinnuoyggj. Hesi árini verkætlanin hevur verið í gongd, eru 20 ymsar listauppsetingar (art installation) settar upp, og er Sakushima vorðin til eina oyggj, har listáhugaði og listafólk streyma til.

Eitt av listaverkunum er sonevnda 'likkuparkeringsplássið', har 50 likkur eru settar upp á ein mola. Listaverkið er hugtakandi, tí tað hevur ein praktiskan týdning, við tað at likkurnar eru veðurhanar og tí vísa ættina, men tað er eisini ein kreativ og stuttlig tilvísing til mentanina og virkisgrundarlagið á oynni, sum annars livir av fiskaríi, og har er likkan kendur fylgisveinur. Síðst, men ikki minst er listaverkið fotogent og stendur seg væl í umhvørvinum á molanum, eitt vørumerki sum hevur verið við til bæði at marknaðarføra og fáa vitjandi til oynna.



Likkur á mola á oynni Sakushima

### ÍBLÁSTUR ÚR GALWAY, ÍRLAND

Galway er fjórðstørsti og skjótast vaksandi býur í Írlandi. Býurin er havnarbýur, lestrarbýur og ferðavinnubýur. Hann hevur vunnið fleiri heiðurslønir fyri sína sjarmu, vakurleika og fyri at vera ein perla at vitja og búgva í. Við sínum knapt 80.000 íbúgvum kann hann ikki samanberast við Fuglafjørð, men sum ferðavinnuvinaligur havnarbýur kann Galway geva íblástur. Eitt eyðkenni í Galway, ið bæði dregur fólk til býin, og sum borgararnir hava stóra gleði av, er sermerkta og fotogena Blackrock Diving Tower frammi við strondina í býarpartinum Salthill. Fyrsta vipputornið kom í 40'unum og er síðan útbygt og ment til tað, vit síggja á myndini.



Blackrock Diving Tower í Galway. Vipputorn við ymsum hæddum

### ÍBLÁSTUR ÚR ABERAERON, WALES

Aberaeron við sínum 1400 íbúgvum liggur á vesturstrondini í Wales. Býurin er ein fiskivinnu- og havnarbýur, ið eisini er kendur fyri síni litføgru hús, livandi bryggjukant og hunangsísar. Alt árið dregur býurin til sín ferðafólk; útlendsk, bretsk og walisisk.

Áhugaverda søgan úr Aberaeron er, at býurin plagdi at vera gráur og keðiligur, men eftir at ein av íbúgvunum málaði húsini ein frískan lit, kom røringur í. Fyrst vóru fólk heldur skelkaði, men síðan avgjørdi býráðið at lata øllum borgarum máling, so teir kundu sleppa tí gráa og keðiliga og geva býnum meira lív og ein frískan samleika.

Tað var býráðið, sum tók støðu og gjørdi eina minimala íløgu, men tað hevur skapt lív og betrað um trivnaðin, og í dag eru øll tey litføgru húsini vorðin partur av samleikanum. Tað hevur gjørt, at býurin er ein væl vitjaður býur við fleiri matstovum, kaféum og handlum. Boðskapurin í søguni er, at við eini visión og nøkrum spannum av máling kann eitt býráð fáa borgararnar at spæla við, flyta býin og við broyttu útsjóndini eisini broyta fatan av býnum sum eitt gott stað at vera.

### ÍBLÁSTUR ÚR SANDAVÁGI, FØROYAR

Í fleiri ár hevur Sandavágur verið kosin Føroya vakrasta bygd. Tað at halda bygdina snøgga og innbjóðandi tykist vera blivin partur av samleikanum í Sandavági og átti at stimbrað og eggjað hvørjum einasta borgarstjóra í landinum at røkka sama máli. Um tað er hesin innbjóðandi hugburðurin og ílegan í bygdini og borgarunum, sum hava ført til, at eitt hitt mest innbjóðandi matarstaðið í landinum, Fiskastykkið, er latið upp í bygdini, kunnu vit bert gita um.

Vit kenna útsøgnina, 'live your life as every day is your last'. Til Fuglafjørð kundi áheitanin verið 'haldi bygdina, sum var hon altíð klár, um dómsnevndin fyri Føroya vakrastu bygd skuldi komið um eiðið, ella man væntaði drotningavitjan'.

Ein vakur og væl hildin staður betrar um umtalluna av staðnum, betrar um sjálvsfatanina og sjálvsálitið og stimbrar við tí undir framtakssemi.

### ÍBLÁSTUR ÚR MIYAJIMA, JAPAN

Lítla oyggin Miyajima, skamt frá Hiroshima í Japan, er ein av mest vitjaðu ferðavinnustøðunum í økinum. Oyggin er serliga kend fyri Itsukushima Shrine, ið stendur úti í flógvanum. Á oynni er ein rennistrongur, ið tekur tey vitjandi upp á toppin á oynni. Heruppi er sera gott útsýni yvir mongu smáu oyggjarnar í Hiroshima Bay. Fyri at tey vitjandi skula fáa sum best burturúr, komin niðan á toppin, eru metalplátur við útkiksholi settar upp, sum virka sum kikarar uttan at vera tað. Hetta er ein framúr góð loysn, serliga tí hon kostar minni, er ómakleys at gera, lætt at seta fleiri upp, og so er hon heldur ikki so veðurviðkvom.



**Fiskastykkið, matstova í Sandavági**

Í Fuglafjarðar kommunu kundu líknandi kikarar verið settir upp, soleiðis sum tað passaði inn í náttúruna uttan at skemma óneyðugt. Annaðhvørt kundu stuttar frágreiðingar verið á staðnum ella QR-koda staðið á, so tann vitjandi fær søguna á fartelefonini. Hetta hevði gjørt gongutúrarnar í fjøllunum kring um í kommununi meira spennandi og forvitnisligar. Tess áhugaverdari tað hevði verið gjørt, lættari hevði tað við hesum eisini verið at stýrt gongufólkunum á røttu leið í fjøllunum.

Neyðugt hevð ikki verið at sett allar upp í senn, men kundi hetta verið gjørt so hvørt. Dømi um ein av hesum kundi verið, at ein kikari var settur upp á Borgini ella tætt við Eingilskahús og vísti niðan á Húsar, og á talvuni og QR-koduni, varð sagt frá, hvussu mann plagdi at kasta grót eftir sjórænarum av hesum staði.




Kunnandi sightseeing, kikarar á Miyajima

## ÍBLÁSTUR ÚR FAABORG, DANMARK

Í gamla havnarbýnum Faaborg á Fjóni hevur mann útbygt marinuna og gjørt eitt sokallað 'havnarbað'. Her er bæði vippa, so ein kann leypa á sjógv, ein hálvgum innibyrgdur hylur, so børn trygt kunna merkja havið uttan at óttast streym og dýpi og fittur kaikantur, har bátar kunnu leggja at. Molin er í hæddum, so gestir kunna sita á trappulaði og hugna sær. Inngongdin til havnarbaðið er somuleiðis gjørd í trappum, sum gera tað til eitt savningarstað, har fólk bæði kunnu sita og eygleiða og vera meira virkin sjálv. Alt havnarbaðið er sera væl gagnnýtt og gjøgnumhugsað. Tað er væl egnað til ung sum gomul, og øll í aldrinum mitt ímillum, umframt at her er goymslustað til kajakkir og annað. Alt í alt, ein perla fyri býin.

## LANDMERKI VIÐ SJÓVARMÁLAN Í FUGLAFIRÐI

Havnarbaðið í Faaborg, vipputornið í Galway og líkkurnar á Sakushima eru øll nevnd fyri at skapa myndir í hugaheimin hjá býráðslimum og øðrum í Fuglafjarðar kommunu.

Í Fuglafirði er vatnsportur populerur, og hóast hetta ítriv hevur ment seg nógv hesi seinnu árini, so er tað einki nýtt. Tey, sum eru eldri enn 40 ár, minnast við gleði, hvussu fyrr var svomið út til Kyrjastein ella flakan, sum lá inni á fjørðinum. Við fokusi á fjørðin, sandin og marinuna kundu vipputornið í Galway og havnarbaðið í Faaborg verið íblástur fyri Fuglafjørð. Kanska við onkrum líknandi, kanska bara við einum uppstigaðum flaka. Møguleikarnir eru mangir, og so er vinningurin.







**Faaborg Harbour Bath (myndir, Urban Agency)**

Tað hevði sett Fuglafjørð á kortið og lokkað vitjandi (føroyingar sum útlendingar), sum gleðast um at leypa á sjógv, til sín. Men tað kundi eisini, um hugt verður til Faaborg, verið gjørt so, at tað eisini fevndi um eitt slag av býarrúmi. Umframt at annað kundi verið knýtt at staðnum, so sum goymsluhølir til t.d. kajakkir, brúsu- og skiftirúm. Soleiðis kunnu neystini á sandinum verða gagnnýtt at vísa Fuglafjørð frá síni fyrikomandi og hugflogsríku síðu. Nakað, sum eyðkennir staðið og fólkini.

Meira fotogent tað er, og betur tað stendur seg í umhvørvinum, jú ítøkiligari gerst tað at marknaðarføra. Eisini verður lættari at knýta heildarupplivingina av marinu, sandi og vatnsporti til sjálvan býin – og onnur ting, sum býurin hevur at bjóða.

Eyðsæð er, at hetta er ikki ein lítil íløga. Tí verður mælt til at kanna, hvørjir grunnar eru, ið stuðla slíkum verkætlanum. Fíggjaður við tipspengunum er danski Lokale og Anlægsfonden (LOA-fonden) áhugaverdur at hyggja nærri at. Grunnurin er virkin viðspælari, ið ger íløgur í størri byggiverkætlanir og fysiskar fasilitetir innan frítíðarlív, t.e. ítrótt, mentan og útilív. Mælt verður til, at kommunan kannar møguleikarnar fyri, í samstarvi við LOA-fonden, at fáa gjørt eitt veruligt landmerki við sjóvarmálan í Fuglafirði. Gjørt í besta kreativa fuglafjarðarstíli, men við íblástri frá áðurnevndu landmerkjum.

## EIGUR AT VERA SETT Í VERK BEINANVEGIN:

GERA EINA VISIÓN FYRI FUGLAFJØRÐ, HELLURNAR OG KAMBSDAL

- HERUNDIR VISIÓN OG ÆTLAN FYRI HOTEL, KAFÉ OG MATSTOVU

SETA Í VERK ARBEIÐI AT FÁA GJØRT EINA VERULIGA MIÐBÝARÆTLAN (VIÐ MARINA)

SAMSTARV VIÐ VINNUNA - TRÍGGJARKRÓNUGRUNNUR & RÁÐGEVARABANKI

KORTLEGGJA TÚRAR OG GERA EIN LEIST FYRI QR FERÐALEIÐARAN

GERA SANDIN STØRRI OG RUDDA OG SNØGGA ØKIÐ

BÝARTORG VIÐ MENTANARHÚSIÐ (FYRST OG FREMST FÁA STONGT VEGIN VIÐ DANSISTOVUNA)

SETA NEYST Á SANDINUM Í STAND, ALMENN VESI OG SKIFTIRÚM

SUMMARHÚSØKI ÚTI Á LAND (FÁA GJØRT TEKNING OG BJÓÐA ÚT)

GONGUTÚRUR UM SKARÐ - TRAPPUSTIGA VIÐ ALTARIÐ & SKELTING

SETA Á STOVN OG LEGGJA LEIST FYRI TRIVNAÐAR- OG FERÐAVINNURÁÐ (EIN VISIÓN ER NEYÐUG FYRI LEISTIN)

SNIÐGØTUR SNØGGAÐAR (SÍÐAN LJÓSSETTAR)

FERÐSLTRYGD - UPPDATERAÐ FERÐMARKARSKELTINI Í FUGLAFIRÐI

# NÆSTA STIG:

SPÆLIPLÁSS Á KAMBSDALI LIÐUGT - SPÆLIPLÁSS Á FISKASTYKKINUM

'SØGAN UM ...' OG TÚRLÝSINGAR GERAST SUM LJÓÐFÍLUR OG LAGDAR ÚT SUM PODDAR

SUMMARHÚSØKI Á HELLUNUM (JØRÐ, TEKNING OG ÚTBOÐ)

MENTANARTILBOÐ

FISKI- OG BÁTATÚRAR

SNØGGA OG RUDDA Í KOMMUNUNI - RUDDINGARDAGAR

NEYST GAGNNÝT TIL ONNUR ENDAMÁL (SAUNA, KAFÉ, O.A.)

KYRJASTEIN - BÁTUR OG ØKI

TRIVNAÐARØKI OG BÝARRÚM VIÐ ÓSAN

FÁA GJØRT EITT LANDMERKI VIÐ FJØRÐIN Í FUGLAFIRÐI (FÁA FÍGGING)

UMSKAPA VARMAKELDU

